Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild, svartkjafti og botnfiski í 2018, 2019 og 2020 og botnfiski í Barentshavinum í 2020
(Leingjan av heimild at taka veiðigjald)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 172 frá 20. desember 2017 um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild, svartkjafti og botnfiski í 2018, 2019 og 2020 og botnfiski í Barentshavinum í 2020, sum broytt við løgtingslóg nr. 179 frá 21. desember 2018, løgtingslóg nr. 149 frá 13. desember 2019, løgtingslóg nr. 171 frá 31. desember 2019 og í § 75 løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Heitið á løgtingslógini verður orðað soleiðis:

"**Løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti í 2018, 2019, 2020 og 2021 og botnfiski í Barentshavinum í 2020 og 2021**"

2. § 1, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Rættindahavari, sum veiðir av rættindum, Føroyar ráða yvir, skal rinda eitt veiðigjald, sum verður lagt á hvørt fiskað kilo í rundari vekt av makreli, norðhavssild og svartkjafti, sum fiskifarið fiskar við fiskiloyvi til makrel, norðhavssild ella svartkjaft í 2018, 2019, 2020 og 2021 og fyri hvørt kilo í rundari vekt av botnfiski, sum fiskifarið fiskar við fiskiloyvi til botnfisk í russiskum sjógvi í Barentshavinum, botnfiski í norskum sjógvi norðan fyri 62°N og botnfiski við Svalbard í 2020 og 2021, tó undantiknar kvotur, sum eru keyptar á uppboðssølu."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2021.

Samtykt á Løgtingi hin 16. desember 2020 við 31-0-0 atkvøðum.

formaður

/
/
skrivari

Konfererað við tað samtykta løgtingslógaruppskotið og funnið beint.

Á LØGTINGI, 16. desember 2020

stjóri

LM-030/2020